gult cyan magenta svart

Mjølnir-Fram 2-3
23-25, 25-27, 25-14, 25-23, 14-16

Næstan luftmangul í KÍ-høllini

Ta› gjørdist eitt satt brak av einum oddadysti, tá Fram og Mjølnir hittust í bestu mansdeildini. Endaliga úrsliti › gjørdist, at Fram vann dystin, men av teimum fimm settunum, var bert eitt, har munurin var meira enn tvey stig

FLOGBÓLTUR



Spenningurin var í hlæddini, tá Fram vann oddadystin á Mjølni um vikuskifti ›

Mynd: Nor›l‡si›

Hóast at vindurin hevur veri› nógvur um vikuskifti›, so hev›i ein ta fatan, at ta› til tí›ir næstan var luftmangul í KÍ-høllini sunnudagin, tá oddali›ini í føroyskum mansflogbólti møttust. Tí hetta gjørdist ein sera spennandi og vælleiktur dystur, vi› gó›um undirhaldi fyri teir um 100 ásko›ararnar, sum høvdu leita› sær í høllina.

Javnt fyrsta sett

Fyrsta setti› enda›i 25-23 til havnali›i›, og ta› var eisini Fram, sum var frammanfyri alt setti›. Bæ›i li›ini n‡ttu fyri ta› mesta kantáleypararnar, sum hjá Fram vóru Rúni Weihe og Jens Heri Mortensen og hjá Mjølni Borko og John Syderbø. Allir hesir komu sera væl frá uppgávum sínum, og ta› var ongantí› í settinum, at ta› eina li›i› fekk nógv stig á ra›.

Romico, leikandi venjarin hjá Fram, valdi henda dystin at byrja á bonkinum, solei›is at hann fekk betri yvirlit yvir dystin, og tá allir leikararnir røktu uppgávuna til fullnar, var eingin orsøk at gera nakra útskifting.



Mjølnir kundi vunni›

Var fyrsta setti› spennandi, kann ta› næsta ikki skrivast vi› or›um. Eisini hetta setti› fylgdust li›ini, men hetta setti› leikti Mjølnir meira vi› skjótum álopum á mi›juni til Trygva H. Poulsen og unga Hjalta Josephsen. Seinast nevndi leikti eitt sera gott 2. sett.

Móti endanum tyktist sum um Mjølnir fór at vinna setti›, og teir høvdu eisini settbólt vi› stø›una 24-23. Men ikki altí› gongur sum ein vónar. Mjølnir servar og Fram hevar ein skjótan bólt til Heina Weihe, sum slær henda beina lei› út um vøllin, og allir ásko›ararnir síggja at bólturn er á veg út, og rómurin er vi› at byrja í høllin, men tá tekur ein Mjølnirleikari bóltin av eini ella a›rari orsøk, og Mjølnir tapti hetta stigi›, og so var 24-24.

Fram-venjarin hev›i í endanum av 2. setti› valt at seta seg sjálvan á li›i›, og hetta var vi› til at tryggja sigurin, tí Fram vann 27-25, og Mjølnir kundi takka sær sjálvum fyri, at sigur ikki kom í hús vi› settbóltin 24-23.

»Vit hava vunni›«

Jugoslavin hjá Mjølnir Borko, hevur uttan iva sagt nøkur gó› or› í ste›ginum millum 2. og 3. sett, tí í ø›rum setti› vann Mjølnir so at siga alt. Ella var orsøkin, at Fram tók sum givi›, at teir høvdu vunni› dystin, tí í 3. setti stó› ta› bara Mjølnir á skránni, hóast teir ikki høvdu broytt leikstílin í mun til tey fyrru settini. Mjølnir vann setti› heili 25-14, og hetta var uppibori›.

Men í fjor›a setti› byrja›i tann rættuligi dysturin aftur. Romico hjá Fram leikti nú fæst inni á li›num í sta›in fyri landsli›sleikaran Ragnar Petersen, sum enn ikki rættuliga er farin at gera um seg. Hann er sterkur í blokkinum, men enn vantar naka› í álopinum, um hann ætlar sær at vera fastur ma›ur á landsli›num.

Rúni eitt gott sett

Ta› var Mjølnir sum kom best frá byrjan í 4. setti, og eitt skifti› førdu teir 14-9, og teir lógu á odda heilt upp á umlei› 20 stig, men tá byrja›i Fram so spakuliga at vinna seg upp á javnleik. Tann stóri leikarin í hesum settinum var Rúni Weihe, sum leikar á kantinum. Hann vann næstan alt sum hann sló› til, og mett ver›ur at hann henda dagin leikti ein av sínum bestu dystum.

Orsøkin til at Rúni eisini fekk nógvar bóltar var tann, at Mjølnir royndi at serva á Jens Hera Mortensen, sum kanska ikki hev›i ein av sínum bestu móttøkudøgum, men vi› neti› var hann ringur at stø›ga.

Men hetta var tó ikki nokk til at basa Mjølni í fjór›a setti, sum enda›i 25-23 til klaksvíkingarnar.

Og so fór luftin

Nú vóru gó› rá› d‡r á›renn 5. og avger›andi setti›. Ein merkti at stórur spenningur var millum ásko›ararnar og ikki minst leikararnar.

Mjølnir kom beinanvegin á odda 3-0 og ein fekk ta fatan, at hetta skuldi vera gondin. Men so vendi dysturin fullkomuliga, og Fram kom framum 6-4, og solei›is fylgdust li›ini fram ímóti endanum.

Í fimta setti kundi ein eisini leggja til merkis, at truppurin hjá Mjølni til henda dystin var ov lítil. Jóannes Poulsen, sum hev›i eitt sera gott kappingarár í fjør›, hevur ska›a, eins og libero-leikarin Arnfinn Gu›jónsson fekk ska›a undir venjing fríggjakvøldi›. Arnfinn hevur seinastu dystirnar leikt sera væl í verjuni fyri Hjalta Josephsen.

Og spenningur var til seinasta bólt, tí stø›an var 14-14, tá Rúni Weihe vi› einum av sínum gó›u smasjum sló› bóltin trygt í gólvi› og kom fram um 15-14. Framleikari servar sí›ani, men av eini ella a›rari orsøk tekur ongin Mjølnirleikari ímóti seinasta bóltinum og hesin fer beint í gólvi›, og stilli var í høllini, til Framleikararnir fóru sigursgongd runt í høllini av gle›i.

Setti› enda›i 16-14 til Fram, men hev›i Mjølnir t.d. bert klára› at vunni› tveir bóltar í verjuni, um Arnfinn hev›i veri›, so hev›i úrsliti› kanska veri› annarlei›is.

Men samanumtiki› ein javnur og undirhaldandi dystur, har bá›ir partar høvdu uppibori› at vunni›. Ta› ver›ur spennandi at síggja, um vit kunnu uppliva fleiri tílíkar dystir seinni.

Runi Weihe Fram

– Dysturin sunnudagin var ein tann mest undirhaldandi dysturin eg havi veri› vi› til, og ta› var sera stuttligt at leika í Klaksvík, tí stemningurin var gó›ur millum teir umlei› 100 ásko›ararnar, sum vóru til dystin.

– Eg vil tó mæla til, at leikararnir fara at styrkivenja meira, solei›is at venjingarstø›an ver›ur enn betur, tí ta› tykist sum um, at tá nógv stendur á, og ein leikar ein langan dyst sum henda upp á umlei› 2 tímar, so eru ta› bóltar, sum kundu ver›i› vunnir, um venjingarstø›an var betri.

– Annars haldi eg eisini, at føroyskur flogbóltur má fara at byrja at fáa dómarar, sum bert takast vi› at døma, tí ta› er ikki nøktandi, at ta› eru leikarar, sum døma hvønn annan, tí í einum slíkum jøvnum dysti gerast leikararnir sera heitir, og ta› prógva›i dysturin eisini sunnudagin, tá leikarar til tí›ir hingu í dómarastólinum.

Trygvi H. Poulsen Mjølnir

– Sunnudagin meti eg at bá›ir partar høvdu havt uppibori› at fingi› tvey stig, men ein vinnari skal finnast, og í hesum dystinum gjørdist ta› havnali›i›.

– Seinastu tí›ina hava vit roynt at fingi› fólk í KÍ-høllina til heimadystirnar, og eftir dystinum í dag at døma, so tykist hetta bera ávøkst.

– Tá dysturin gerst so langur sum hesin, so sakna›u vit Jóannes Poulsen og Arnfinn Gu›jónsson, sum m.a. leiktu sera væl ímóti SÍ, tí ta› hev›i veri› sera gott, um vit t.d. kundu gjørt onkra útskifting í 5. setti, tí m.a. Jóannes kann bæ›i leika á kantinum og á mi›juni.

– Men vit mugu fara at arbei›a vi› at fáa ein størri trupp, tí ta› vísir seg at dystirnir gerast har›ari og har›ari.

gult cyan magenta svart

ÍF-SÍ 3-1
25-13, 25-13, 26-28, 25-6

ÍF vil vera vi ›

Ta› letur til, at fuglfir›ingar nú aftur eru um at koma á rætta lagi›, eftir at teir annars hava havt eina heldur trilvandi byrjan

FLOGBÓLTUR

Byrjanin á landskappingini hjá ÍF hevur veri› heldur løgin. Í fyrsta umfarinum spældu teir ímóti Mjølni. Tá høvdu menn valla vant saman, og n‡ggi venjarin var komin til landi› dagin fyri. Tann dystin taptu teir akkurát. Seinasta vikuskifti var frívikuskifti, so nú skuldu teir vísa, um nakar dugur er í, og ta› letur til, at ta› er.

Stór framgongd

ÍF hevur í ár ikki so nógvar leikarar, men teir sum eru, eru gó›ir og eru royndir. Ungdómsarbei›i› hevur ligi› stilt, men nú er gongd komin á aftur. Ta› ganga tó nøkur ár, á›renn teir leikararnir eru klárir at spæla í meistaradeildini.

ÍF vísti leygardagin, at teir saktans kunnu vera vi› í strí›num um hei›ursmerkini. Li›i› tóktist at vera nógv meira samanspælt nú, og venjingarstø›an er eisini betri. Venjarin Boban Ilic hevur fingi› skil á, og einki er at ivast í, at ta› trongdi til. ÍF hevur mangan fingi› alt ov líti› burturúr, einamest tí venjingarstø›an ikki hevur veri› nóg gó›.

Í dystinum leygardagin gekk í tveimum teimum fyrstu settunum sera væl hjá ÍF. Sí hótti ongantí›. Teir høvdu trupulleikar at fáa spæli› at ganga, serliga torført var at fáa móttøkuna nóg gó›a, so at álopsleikararnir kundu vinna naka›. Sune Hansen er venjari hjá SÍ, og hann er einasti leikarin á li›num, sum hevur royndir. Hinir eru fleiri unglingar. Teir eru millum bestu ungu leikararnar í landinum, men í meistaradeildini eru teir ikki nóg búnir enn. Í fyrstu settunum var tí einki hjá unga SÍ li›num at gera.

Gott 3. sett

ÍF hev›i fullkomi› tak á dystinum, og sum so ofta, tá i› so er, fara menn at taka sær av løttum. SÍ lá og lúrdi, og teir megna›u at koma inn aftur í dystin. Spæli› hjá teimum var nógv betri í 3. setti, men ÍF hjálpti væl til, tí teir vóru als ikki so avgjørdir sum í teimum fyrru settunum. SÍ vann hetta setti›, og ta› var ikki sórt, at dysturin sá út til at fáa eina heldur óvænta›a vend.

Stokkut gle›i

Boban Ilic man hava givi› sínum leikarum av grovfílini í ste›ginum millum settini, tí ÍF var ikki at kenna aftur í 4. setti. Sí fekk fyrsta stigi›, men so fór Bartal Eliasen aftur at serva, og hann avgjørdi dystin. Tá i› hann gavst, var ÍF frammanfyri 13-1, og dysturin var avgjørdur. Boban og Kenneth vóru frammi vi› neti›, me›an Bartal serva›i, og teir vístu hvussu ein bóltur skal sláast. Boban hevur sera gott smash, og Kenneth er heldur ikki fyri ongum. Saman vi› Bartali vóru teir bestu leikararnir í dystinum.

ÍF hevur nú fingi› gongd á kappingarári›, men SÍ hevur framvegis einki vunni›. SÍ fer helst at geva onkrum li›um trupulleikar, tá i› Anfinn Joensen og Jón Nielsen vera vi›.

Havnar Svimjifelag vann

Stór svimjikapping var› hildin í Vági um vikuskifti›, har øll svimjifeløgini í landinum vóru umbo›a›

SVIMJING
Tí›indaskriv



Úti vi› 600 svimjarar luttóku í stóru svimjikappingini, sum Tvøroyrar Svimjifelag skipa›i fyri um vikuskifti ›

Mynd: SJH

Um vikuskifti› hevur Tvøroyrar svimjufelag skipa fyri svimjikapping í Vági. Kappast bleiv bæ›i fríggjakvøldi›, leygardagin og sunnudagin. Kappast bleiv í bólkunum 3, 4, 5 og opin.

Stóri vinnarin gjørdist Havnar Svimjifelag, sum vann heili› 59 gull, 40 silvur og 30 bronsu. Nummar tvey gjørdist Tvøroyrar Svimjifelag vi› 20 gull, 19 silvur og 10 bronsu. Nummar tr‡ gjørdist Ægir vi› 17 gull, 9 silvur og 6 bronsu. Nummar f‡ra Vágs Svimjifelag, Nummar fimm Skeggjar, nummar seks Flot og nummar sjey Fuglafjar›ar Svimjifelag.

Nevnast kann, at Havnar Svimjifelag hev›i eisini tí nógv størstu luttøkuna. H.S. hev›i 200 tilmeldingar, meira enn ein tri›ing av allari luttøkuni, Skeggjar úr Gøtu hev›i 100, Tvøroyar Svimjifelag 73, Flot 64, Ægir 56, Vágs Svimjifelag 54 og Fuglafjar›ar Svimjifelag 41. Har afturat luttók Ægir ikki sunnudagin, tí teir fóru heim vegna stormin, sum hevur herja› alt landi.

Annars er gle›iligt, at tey minnu feløgini eru byrja›i av álvara at gera seg galdandi, tí tey vunnu ikki færri enn 21 gull, allar í teimum yngru bólkunum.

Svimjikapping gekk væl og frættist úr Su›ri, at fleiri av teimum ungu svimjarunum høvdu betra tí›irnar nógv.

Endaliga stø›an gjørdist hendan

Nr. 1
Havnar Svimjifelag, 59 gull, 40 silvur, 30 bronsu

Nr. 2
Tvøroyrar Svimjifelag, 20 gull1, 9 silvur, 10 bronsu

Nr. 3
Ægir, 17 gull, 9 silvur, 6 bronsu

Nr. 4
Vágs Svimjifelag, 10 gull, 5 silvur, 11 bronsu

Nr. 5
Skeggjar, 8 gull, 10 silvur, 10 bronsu

Nr. 6
Flot, 7 gull, 1 silvur, 3 bronsu

Nr. 7
Fuglafjar›arSvimjifelag, 2 gull, 5 silvur, 5 bronsu